


# The Story Ends

## – rokktónleikurin fer nýggjar leiðir

Undir heitinum The Story Ends hava nakrir ungdómar funnið saman. Teirra aðalmál er at skriva og spæla nútímans rokktónleik, soleiðis sum vit m.a. kenna hann úr Onglandi. Fyri kortum góvu teir út EP'ina "The Story Ends", sum er á tremur við góðum frískum hugskotum, meðan fløgan eisini ber brá av at talan er um ungar tónleikarar, sum ikki eru heilt brýndir enn

FLØGUUMMÆLI

*Rókur Jákupsson Jakobsen*
*(rokur@sosialurin.fo)*

Men lat okkum staðfesta beinanvegin, at fyrsta fløgan hjá The Story Ends er ein djørv debut. Teir fara óimponeraðir til verka, og tú hómar ein frískan anda yvir tónleikinum. Á fløguni eru seks løg (Í veruleikanum eru sjey løg, tí um tú ert ordiliga tolin, kanst tú hoyra eitt goymt lag). Tónleikurin er gittar-baseraður rokk/punk/popptónleikur, og røddin hjá Filip er at meta sum eitt frískt lot í tí føroyska tónlistarliga landslagnum.

Men har eru eisini nøkur minus at finna. Fyri tað fyrsta haldi eg at bólkurin skal leggja seg eftir at spæla betri saman. Tey einstøku ljóðførini verða handfarin rímiliga væl, men samanspæli í bólkinum er ikki nóg gott Serliga tí, at tónleikurin inniheldur nógvar markeringar sum skulu sita "tight" og kontant. Tá verður talan um eitt kompromis sum ikki má gangast á møti. Bólkurin má spæla meiri sannførandi, fyri at geva tónleikinum karmar at grógva í.

Eitt annað stórt minus á fløguni er ljóðgóðskan. Á onkrum lagið er ljóðmyndin stór og góð, men aðrastaðni er hon fløt og smøl. Lurtarin fær ikki nóg nógv burturúr tónleikinum um ljóðgóðskan ikki er í lagið, so hetta er eitt stórt minus við fløguni. Serliga haldi eg, at trummurnar onkuntíð ljóða meiri sum pappeskjur enn trummur.

Eisini skal The Story Ends royna at halda ein reyðan trá í løgunum. Tónleikurin er merktur av, at hann er settur saman av ymiskum brotum, heldur enn at verða eitt samanhangandi lag. Onkuntíð er tónleikurin eisini settur saman av ov nógvum brotum – eitt nú haldi eg, at Dancing Around Honolulu inniheldur ov nógv brot, sum ikki hanga alt ov væl saman.

### Mjúk Byrjan

Vakra lagið "Honey" er ein mjúk byrjan uppá fløguna. Her hómast ein inniligur longsul, men longu 50 sekund aftaná lagið er byrjað, bresta hátalararnir út í hittið "Dancing Around Honolulu", sum fyri nøkrum mánaðum síðan lá á ovastu rók í 15 teimum bestu. Hetta lagið er eisini tað sterkasta á fløguni. Lagið inniheldur eitt feitt gittarriff, sum ger at tú beinanvegin spílar oyrini út. At lagið hevur ein frekan melodi, ger at lagið verður lyft á eitt høgt støðið. Hetta er eisini nógv tað besta lagið á fløguni.

Sangarin, Filip Mortensen, syngur einfalt. Har er ikki so nógv reyp og fjas, og denturin verður lagdur á framførslu av melodium - gott, meir av hasum. Filip verður tó noyddur at arbeiða meiri við síni úttalu. Tú hómar, at hann ikki ger sær so nógvan ómak við tí enska málsliga framburðinum, og er hetta keðiligt fyri heildarmyndina á fløguni.

"The Ballad of a Four Headed Monster" er eitt rættiliga stuttligt lag. Niðurlagið er fangandi, men tað sum oyðileggur lagið fyri meg, er tann veika ljóðmyndin. Trummurnar og gittarirnir eru so bleytir, at ljóðmyndin bara líkist einum fyribils mixið. Og hetta er tíanverri gjøgnumgangandi fyri næstan alla fløguna. Løgini koma ikki til sín rætt, vegna ivasomu ljóðgóðskuna.

### Svingandi dygd

Eitt sum eisini merkir tónleikin á fløguni, er tann svingandi dygdin í lagskrivingini. Meðan trý tey fyrstu løgini á fløguni hvør sær innihalda góð momentum, so er tað onki av løgunum, sum ordiliga livur upp til vónirnar.

Serliga eru tey bæði "Birmingham" og "Good Intuition" tunn. Men bólkurin skal hava tað rós, at teir ikki leggja seg eftir einum "føroyskum" ljóðið. Tónleikurin hjá The Story Ends er nýggjur í føroyskum høpi, og tí kunnu vit ikki lata vera við at viðurkenna týdningin av hesi fløgu.

Hon er týdningarmikil, tí at bólkurin kann geva íblástur til eina nýggja vend í tí føroyska tónleikinum, sum í langa tíð hevur verið merktur av myrkum, hørðum og hugtungum rokki. Sostatt kann fløgan hjá The Story Ends vísa seg, at verða ein loystur knútur á føroyska tónleikapallinum.